

## Skjótasti svimjarin hevur móttøku

27. og 29. apríl setti Kristian Olsen – Ægir nýggj í 100 m og 50 m frísvimjing. Ikki minst var talan um framúr avrik á 50 metrum, tí við 23,97 sekundum varð Kristian fyrsti føroyski svimjarin, sum fór undir 24 sekund á teininum. Matið á 100 metrum er nú 52,49 sekund. Mánadagin klokkan 18 verður móttøka í Býráðshøllini í Klaksvík, har Kristian verður heiðraður.

## Heini og Helsingør fluttu niður

Tveir teir farnu sunnudagarnar hevur liðið hjá føroyska Heina Hanusarson, Helsingør, leikt upp- og niðurflytingardyst ímóti HF Mors. Hetta var avleiðing av at Helsingør endaði á næstaftasta plássi í bestu deildini. Helsingør tapti dystin, og megnaði tí ikki at halda seg í bestu deildini. Fyrri dysturin endaði 32-31 til HF Mors, meðan sama liðið við einum tryggum 31-24 sigri í seinna dystinum kann gleðast yvir, at teir komandi kappingarár leika í bestu deildini. Heini Hanusarson hevur annars havt eitt stak gott kappingarár í felagnum, har hann fleiri ferðir hevur verið toppskjútti á liðnum.

### – Hetta kennist illa

Sámal Joensen, liðformaður hjá GÍ, staðfesti eftir dystin, at tapið fyri grannunum úr NSÍ var ein herskin biti at svølgja.

– Hetta kennist illa. Vit høvdu tak á teimum í fyrra hálvleiki, men missa so í seinna hálvleiki, tekur liðformaðurin stutt saman um dystin.

– Dysturin var annars rímiliga javnur og kundi koppa báðar vegir, men verður hugt samanum eftir málkjansum, so var tað helst uppiborið, at NSÍ fekk trý stig, sigur Sámal Joensen.

GÍ liggur nú á áttanda plássi í Formuladeildini, men Sámal Joensen metir kortini ikki støðuna vera kritiska hjá GÍ.

– Vit skulu bert rætta upp á nøkur ting og fáa nakrar barnasjúkur burtur, so koyrir tað aftur, sigur hann.

### – Nú koyra vit heilt upp í topp

Hjalgrím Eltør legði upp til seinna málið hjá NSÍ móti GÍ í gjár, og hann er ikki í iva um, at NSÍ var rætti vinnarin.

– Tað er einki at ivast í, og um vit hyggja at kjansunum, so hevði tað verið ein skandala, um vit ikki fingu trý stig. Fyrri hálvleikur var hampiliga javnur, har vit tó hava fleiri kjansir, men í seinna hálvleiki er klassamunur á liðunum, staðfestir klaksvíkingurin hjá NSÍ.

Eftir tvey útivallartap á rað, kom tað væl við at vinna á grannunum í Gøtu, og sigurin ætlar NSÍ sær at byggja víðari á.

– Nú fara vit at koyra víðari, og vit skulu heilt upp í toppin, tað er einki at ivast í, sigur avgjørdi, men fegni Hjalgrím Eltør.

GÍ – NSÍ 1-2 (1-1):

# Runavíkingar reistust í Sarpugerði

**Bæði GÍ og NSÍ høvdu brúk fyri at reisa seg, tá liðini brustu saman í grannauppgerð í Sarpugerði sunnudagin. Og tá 90 minuttir vóru spældir stóðu runavíkingar eftir sum sigursharrar, meðan GÍ aftur tapti á heimavølli**

*GÍ*

*NSÍ*

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Støðuga trýstið, sum NSÍ legði í seinna hálvleiki, gav at enda úrslit. Sigurin var altavgerandi, um NSÍ skuldi fylgja við oddinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

NSÍ var betra liðið á vøllinum í Sarpugerði í sunnudagin. Teir høvdu fleiri kjansir, vístu betri spæl og vóru eisini heldur grammari. Tí ber illa til at staðfesta annað enn, at sigurin var fult og heilt uppiborin.

Dysturin var annars ikki nøkur stór uppliving. Neyvan høvdu áskoðararnir roknað við hesum frammanundan, tí hvørki heimaliðið ella gestirnir hava víst stórspæl higartil í ár. Men ein tættan og dramatiskan dyst kundu teir rokna við, eftir sum talan var um grannauppgerð og at bæði liðini róptu eftir sigrinum. Dysturin gjørdist tó ongantíð serliga spennandi, tættur ella dramatiskur. Partvíst átti NSÍ æðrina av hesum, tí teir vóru tað betri enn GÍ, og hin stóra leiklutin átti keðiligi veðrið, sum oyðilegði stórar partar av dystinum.

### Eitt mál í part

NSÍ legði bragdliga fyri. Tá eitt korter var spælt høvdu teir fleiri ferðir spælt seg ígjøgnum GÍ-verjuna, sum var til at tosa við, og sent fleiri ávaringarskot av móti Geza Turi.

GÍ hevði ikki rættiliga fingið fótin fyri seg. Í verjupartinum stóðu teir ikki rætt og frameftir høvdu teir einki at bjóða uppá. Men tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin sendu teir ein bólt langt niðan á hálvuna hjá NSÍ. Verjan fer skeiv av bóltinum, sum hoppar upp um bæði Jóhan Troest Davidsen og Óla Hansen, og so hevur Sverri Jacobsen beina kós móti málinum. Jens Martin Knudsen kemur tó væl út og órógvar áleyparan, so einki meiri spurdist burtur úr.

Hetta var fyrsta álopið frá GÍ, og tveir minuttir seinni vóru teir aftur framvið. Sámal Joensen leggur frísparksinnlegg úr høgru inn til handaru stong, har fyrrverandi NSÍ-leikarin Pól Jóhannus Justinussen trygt setir bóltin í netið.

Leiðslan GÍ fekk var á ongan hátt í trá við spælbýtið í dystinum higartil. Tí var tað ikki annað enn uppiborið, tá Einar Hansen javnaði stutt fyri hálvleik. Andy Olsen leggur hornaspark innfyri og málverjin Geza Turi skal boksa bóltin burtur. Hetta eydnast ikki heilt, og so dettur bólturin fyri føturnar á Einar Hansen, sum við einum knallhørðum skoti setir bóltin uppundir nettakið. Stutt eftir varð bríkslað til hálvleiks.

### Trýstu allan seinna hálvleik

Í seinna hálvleiki hevði NSÍ vindin við sær, og teir hildu áfram at trýsta sum teir høvdu gjørt í fyrra hálvleiki. Ferð eftir ferð var um reppið, at teir fingu bóltin í kassan. Millum annað hevði Hjalgrím Eltør eitt skot á stongina, og eina aðru ferð slapp hann framvið Geza Turi, men skotið varð bjargað á strikuni, og eina triðju ferð varð Hjalgrím Eltør feldur inni í brotsteiginum og áskoðararnir kravdu brotsspark, men fingu tað ikki.

Allan seinna hálvleik tóktist tað sum um, at eitt mál var á veg og tveir minuttir fyri leiklok kom hetta. Hjalgrím Eltør var høvuðsarkitekturin aftanfyri hesa skoring, tá hann spældi seg ígjøgnum verjuna við innskifta Øssur Dalbú sum banda, áðrenn hann legði tvørtur um til Nenad Stankovic, sum uttan stórvegis hóvastak setti bóltin í tóma netið.

Eitt frálíkt mál, har Hjalgrím Eltør spældi skjótt og skilagott, heldur enn at halda uppá bóltin, sum hann hevði gjørt so nógvar ferðir framman undan.

Soleiðis gekk tað fyri seg, tá NSÍ reisti seg í Sarpugerði, meðan GÍ framvegis er liggjandi og á áttanda plássi í Formuladeildini.